Jólahugni og lívsgleði í Kirkjubø og á Velbastað

JÓLAHALD
Orð og myndir:
Jan Müller

Frá hugnaligu løtuni í Ólavskirkjuni við sangkórinum í sóknini

Leygardagin var jólahald í Kirkjubø og á Velbastað. Og í báðum førum setti sangkórið í sóknini, Sólarmagn sín dám á. Børn og vaksin fyltu ta hugnaligu Ólavskirkjuna. Til konsertina vóru bæði jólasangir og annar kórtónleikur. Tað hevur ongantíð verið urga í kirkjuni men hesaferð stuðlaði urga so undir onkrum av sangunum. Við urguna sat eingin minni enn okkara frægi kórleiðari og tónleikalærari Bjarni Restorff. Aftaná eina væleydnaða og vælvitjaða konsert varð farið í grannabygdina at hátíðarhalda løtuna, tá jólatræ fyri fyrstu ferð alment var tendrað í sóknini.

Til hetta hátíðarhaldið kom eisini prestur úr Havn. Heri Joensen talaði fyri sóknarfólkunum umframt borgarstjóran Annfinn Brekkstein.

Í talu síni vísti Annfinn Brekkstein á, at tíðirnar broytast eisini í Kirkjubøar- og Velbastaðar sókn. Fyrsta jólatræið hann mintist, var tá hann var við systir síni í føðingardag hjá Katrin, dóttir Bergith.

– Tað, sum eg haldi var serligt við tí føðingardegnum, var, at Katrin fylti um páskirnar, og tá stóð jólatræið framvegis í stovuni hjá Bergith. Hon ynskti at hava tann hugnan sum jólini geva, at vara líka til páskar, so tey børnini, sum vitjaðu Katrin, eisini fingu lut í hugnanum.

Tey í Búðini skipaðu eisini fyri jólahaldi fyri okkum børnum. Serliga var tað Dánjal, gubbi, sum hevði størstu gleðina av at hava okkum børn rundanum seg. Hann var sera fegin um at vera saman við okkum, og hann dugdi sera væl at skipa fyri. Tað, sum ger jólahaldið í Búðini sera minningarríkt, vóru eisini søgurnar hjá Jensiu, sum dugdi sera væl at siga frá.

Annfinnur fegnaðist um, at jólatræ nú verður tendrað í sóknini Tað er fyrstu ferð at jólatræ alment verður tendrað í sóknini. Træið stendur uttan fyri nýggja skúlan á Velbastað. Tað er so trivnaðarbólkurin í skúlanum, sum saman við kommununi hevur tikið stig til jólatræið.

Borgarstjórin helt fram: – Jólatræið ber okkum boð um nógv. Børnini gleðast um at tey fáa pakkar. Børn og eldri gleða seg til jólahátíðina, tá Jesus var føddur, og tann gleðiboðskap sum jólini hava. Tað hevur stóran týdning, at vit ikki missa jólaboðskapin burtur í øllum tí verðsliga, men at vit geva okkum stundir at steðga á og minnast gleðihátíðina.

Og jólahátíðin ber okkum eisini boð um, at ein myrkur vetur er við at halla. Hetta hevur higartil verið ein avbera góður vetur, og um tvær vikur hava vit longu stytsta dag, og tað fer aftur at ganga ímóti ljósari tíðum.

Tað gleðir okkum at kórið Sólarmagn fær dygga undirtøku í sóknini, og kann vera við til at seta dám á eina hátíðarløtu sum hesa.

Ikki tí, tað hava altíð verið góð kvæðafólk og sangarar á Velbastað og í Kirkjubø, bæði til dans og til at syngja Kingosálmar. So einki løgið er í, at góð gróðrarlíkindi eru fyri einum sangkóri, sum vónandi fer at mennast í framtíðini.

Tað er mín vón, at hetta tiltakið fer at halda fram á hvørjum ári, so yngri og eldri kunnu koma saman at gleðast um at jólatræið verður tendrað segði Annfinnur Brekkstein.

Jólatræ varð fyri fyrstu ferð alment tendrað í Kirkjubøar - og Velbastaðar sókn leygardagin.

Gleðið tykkum

Síðani talaði prestur. Helt helt fyri, at var lívið bert gráir gerandisdagar høvdu vit kett okkum. – Hvørt ár, tá dagurin av álvara tekur at styttast og náttin at leingjast, so nærkast vit eisini jólunum. Hvønn sunnudag í adventini verður ett ljós tendrað á adventskransinum inntil øll fýra lýsa, tí nú er stundin nær tá hitt stóra ljósið verður borið í heimin. – Jesus Kristus – Tann dagin Ljóðar epistultekstur-in í kirkjum okkara. – »Gleðið tykkum í Harranum altíð! Eg sigi uppaftur: Gleðið tykkum.« Heri Joensen prestur segði viðari, at vit skulu royna at taka apostulin upp á orðið. – Lat okkum finna gleðina í tí, sum vit takast við. Gleði kann eisini vera í jólafyrireikingunum, ongin ivi um tað. Gleðina finna vit m.a. í tí at skapa, vera virkin og eg haldi meg ikki taka munnin ov fullan, tá eg komi við pástandinum: »Vit kunnu ikki keypa okkum jólagleðina.«

Og prestur helt fram: – Tað er innan í okkum, at tað heila hendir. – Her skapast hin sanna gleðin. Gleðin fæst við »at verða«. At verða saman við øðrum menniskjum. Í felagsskapum, til felags tiltøk, til konsertir í kirkjum okkara nú undan jólum, til guðstænastur og aðrar samkomur. Men eisini við at hugna um heima við hús, har vit í felagsskapi gleða hvønn annan. Gleða vit onnur menniskju, so gleða vit eisini á hendan hátt okkum sjálvi. Lat okkum tí arbeiða málrættað við jólafyrireikingunum. Ikki renna aftaná hvørjum tilboði – tí tey eru mong. Ikki keypa yvir evni. Tí alt hetta,ið »eyga sær og hjarta begjer« fer ongan veg, men verður á sínum stað komandi advent. Gevi Guð okkum øllum jólafriðin, hina sonnu jólagleðina segði Heri Joensen prestur, tá jólatræ fyri fyrstu ferð alment varð tendrað á Velbastað.

Eftir røðurnar sang kórið nakrar sangir, og síðani varð farið inn í skúlan at fáa sær kakao og bollar. Ein hugnalig og dámlig løta í Kirkjubø og á Velbastað. Ein løta, sum savnar sóknarfólk og fær tey at kenna seg sum part av einum felagsskapi.

Annfinnur Brekkstein, borgarstjóri flutti fram røðu

Eisini Heri Joensen prestur av við til at gera hátíðarhaldið so hugnaligt

UTTAN ÚR HEIMI

Fullveldi og hvat so?

Kaj Leo Johannesen

Tjóðveldisflokkurin heldur tað verða av ovurhondsstórum týdningi, at vit skulu hava fullveldi fyri ein og hvønn prís sum skjótast. Hetta er greið og konkret útmelding, og sum so einki nýtt undir sólini fyri henda flokk.

Lat okkum nú siga, at Føroyar hava fingið fullveldi, og nú skal stingast víðari út í kortið, flokkurin hevur sagt nei til ES ella Evropa við øðrum orðum, hvussu skulu nú Føroyar skipast uttanfyri ríkisfelagsskapin. Kundi okkurt umboð fyri flokkin víst mær á nakrar konkretar tjóðveldisloysnir hesum viðvíkjandi?

Tosa vit um okkara útflutning, so hava Føroyar í skrivandi løtu tær allar ringastu treytir, sum nakað land yvirhøvur hevur í mun til ES. Vit eru ein fløskuhálsur í Evropa, somikið havi eg lært, aftaná at hava arbeitt og handlað við ES lond í nógv ár. Eg eri vorðin alt meira sannførdur um, at vit hava meira brúk fyri ES, enn teir fyri okkum.

Metir Tjóðveldisflokkurin, at vit skulu hava okkara egnu serføroysku vinnulóggávu, sum ikki samsvarar við ES vinnulóggávu?

Føroyar hava tíanverri eftir mínum tykki valt at vera uttan fyri meginrákið í evropeiska samstarvinum. Okkara viðurskifti eru ístaðin skipað í eini handilsavtalu og eini fiskiveiðiavtalu. Fyri onnur øki eru ongar avtalur partanna millum. Tann størsta avleiðingin av hesum er, at vit eru vorðin ein bananrepublikk mitt í Norðuratlantinum, tá talan er um okkara frælsismenning mótvegis ES.

Tá talan er um útbúgving og gransking í ES høpi, verða vit sjálvandi eisini roknað sum triðja land. Tað er eingin avtala ímillum Føroyar og ES. Higartil hava vit kunnað brúkt Danmark sum smogu ella ventil, tá talan er um vinnubrøv ella prógvbrøv, eisini har eru vit afturúrsigldir.

Tosað vit um mannarættindi, skulu vit hava okkara egnu serføroysku lóggávu, ella skulu vit fylgja ES/ST lóggóvu/reglum á hesum øki, soleiðis at vit hava somu reglur og somu ábyrgdir sum onnur lond í heiminum?

Tosa vit um verjumál, skulu vit hava okkara serføroysku lóggávu á hesum øki, ella skulu vit samstarva við Nato ella annan felagsskap? Er tað nakar annar felagsskapur, sum hevur fyrimunir ella vil gera alliansur við Føroyar? Og hvat kunnu vit geva frá okkum, tá tá talan er um verjupolitikk, sum í øllum lívsins viðurskiftum er talan sjálvandi eisini her um »to give and take« ella rættari at geva og fáa.

Tosa vit um gjaldoyarpolitikk, skulu vit hava eina føroyska krónu, ella skulu vit møguliga hava eina íslendska krónu, ella skulu vit fylgja Danmark, um teir fara yvir til Evruna, ella skulu vit eisini á hesum øki hava okkara serføroysku loysn?

Hvat er tað, sum Tjóðveldisflokkurin meinar við, tá hann sigur, at vit ikki eru fræls, eitt nú í mun til ES lond? Hvussu metir Tjóðveldisflokkurin, at tann meinigi maðurin ella kvinnan fær tað frælsari aftan á eitt føroyskt fullveldi? Metir flokkurin, at tað er betur at standa uttan fyri Evropa, tá vit um fá ár síggja millum 25 og 30 lond gerast limir í ES.

Fakta er, at vit í løtuni ikki hava nøkur av teim frælsunum, sum ES arbeiðir við fyri sínar borgarir. Hetta eru eisini tey frælsini, sum undirritaði skilir við, tá talan er um okkara framtíð í Evropa nevniliga og frælsini at liva og arbeiða í limalondunum rundan um okkum.

Vil Tjóðveldisflokkurin hava serføroyskar loysnir, til tey allarstørstu frælsini, vit sum menniskju kunnu fáa? Ella vil Tjóðveldisflokkurin taka undir við mínum hugsjónum um persónligt frælsi?

At føroysk arbeiðsmegi fær tað sama persónliga frælsi, sum ES - borgarar hava.

At føroyingar fáa ta somu sosialu trygdina, sum ES - borgarar hava.

At føroysk virki og sjálvstøðugt vinnurekandi fáa tað sama frælsi, sum virki og sjálvstøðugt vinnurekandi í ES hava.

Afturfyri hesi frælsini kann so ríkisfelagsskapurin lata ES-borgarum og ES-virkjum somu frælsi sum í Føroyum, treytað av, at vit eru í ríkisfelagsskapi t.e., áðrenn eitt eventuelt fullveldi eftir tjóðveldis leisti.

Tað er mín persónliga meining, at Føroyar eru stórar sum tjóð, og at vit hava evni og ábyrgd av einum frælsum og friðarligum Evropa, sum hevur verið okkara felags grundvøllur í meiri enn túsund ár.

Vit eiga ikki at vera uttan fyri ES, tí so hava vit onga ávirkan. Við at vera við í ES, eru vit samtíðis við, har avgerðir verða tiknar. Eg meini, at vit eiga at skipa okkara uttanríkispolitikk øðrvísi, soleiðis at vit føroyingar sita framman fyri í bilinum, táið avgerðir verða tiknar, sum hava tað minsta við føroysk viðurskifti at gera.

Vit skulu í nógv størri mun trekkja upp á okkara sendistovur uttanlands bæði føroyskar sum danskar, um 10 ár møguliga ES sendistovur, hvør veit, útviklingin gongur skjótt fyri seg og eiga vit eisini at mennast samsvarandi. Um broytingarnar rundan um okkum binda ella loysa okkum leysari úr ríkinum, so eiga sjálvt eisini vit sambandsfólk at fylgja við rákinum, um vit meta, tað tænir fólki okkara, og ikki frysta føst í ov stóran mun, tað tænir ikki fólkinum her á landi.

Eg fari við hesum at rætta hondina út til eitt mennandi kjak um okkara framtíðarstøðu í Evropa, uttan mun til um vit eru á Tjóðveldisvonginum ella Sambandsvonginum, so eiga vit at minnast hitan av forfedranna hondum, sum sleptu, og sum stríddust fyri einum betri Føroyum. Latið okkum í virðing fyri okkara fólki fáa eitt gott og mennandi kjak um okkara framtíð her á klettum í einum frælsum Føroyum, hvar orðið frælsi ella persónligt frælsi, verður smeltað saman av framtíðartýðingini av sama orði, millum Tjóðveldi og Samband.